Toll- og Skattstova Føroya

# Málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Figgjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Suðuroyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 13 starvsfólk.

*Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo*

*E-mail: suduroy@tollskatt.fo*

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, er eitt starv leyst at søkja til setan 15. juli 2003.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, og tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir innan roknskap og bókhald. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleika fyri eftirútbúgving,
- klokkuskipan við flextíð,
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Suðuroyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar, eitt nú merkonom , HD o.a. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

**Nærri frágreiðing** fæst við at venda sær til Margret Joensen, Økisstjóra, á tlf. 37 10 51.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 1. juni 2003.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri


# Nýggjar TANNPROTESUR

r tin ar u v lin ar av lu r t su

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480



# Skrivstovuhølir í Saltangará

Í nýggja handils- og skrivstovubygninginum hjá ERO P/f á Heiðavegi 15 í Saltangará eru skrivstovuhølir til leigu. Áhugað kunnu venda sær til ERO P/f á tlf. 44 96 12.

**ERO P/f**



http://www.sosialurin.fo

Sosialurin

www.sosialurin.fo



TK Stovan

# Tveir kunningarfundir:

## B2B marknaðarføring

**Mánadagin 19. mai kl. 13.00-16.00 á Hotel Føroyum**

## Customer Relationship Management (CRM)

**Týsdagin 20. mai kl. 13.00-16.00 á Hotel Føroyum**

TK Stovan skipar 19. og 20. mai fyri tveimum kunningarfundum. Á kunningarfundinum 19. mai verður Business-to-Business marknaðarføring á skrá. Business-to-Business marknaðarføring ella B2B, sum tað eisini verður rópt, snýr seg í stuttum um, hvussu tú kanst marknaðarføra tína vøru ella tænastu móti øðrum virkjum; hetta við sølufólkum, sølubrøvum, heimasíðum, lýsingum, messum og øðrum. Kunningarfundurin 20. mai snýr seg um Customer Relationship Management (CRM). Tú lýsa vit, hvussu tú kanst savna inn, skipa og gagnnýta vitan um og samskifti við kundarnar.

Kunningarfundirnir eru ætlaðir teimum, ið selja til virkir og onnurs teimum, ið halda evnið vera áhugavert. Ætlanin er, at kunningarfundirnir skulu hanga saman evnisliga, men tú kanst sjálvandi eisini at luttaka á einum fundi. Tað veldst um tørv og áhuga.

Skeiðshaldarar eru Mogens Ramsing og Poul Henrik Poulsen. Mogens Ramsing, www.mrgruppen.dk, hevur drúgvar royndir við sølu og marknaðarføring, bæði tá tað ræður um ráðgeving og skeið. Poul Henrik Poulsen arbeiðir sum ráðgevi og hevur praktiskar royndir bæði við sølu og marknaðarføring - í Føroyum og uttanlands.

**Skrá 19. mai**
Kl. 13.00 Vælkomin
Kl. 13.15 Hvat er B2B marknaðarføring?
Hvussu kunnu vit arbeiða við B2B marknaðarføring?
Hugskot og kveiking
v/Mogens Ramsing
Kl. 15.00 Royndir við B2B marknaðarføring og sølu í Føroyum
v/Poul Henrik Poulsen
Kl. 16.00 Kunningarfundurin endar

**Skrá 20. mai**
Kl. 13.00 Vælkomin
Kl. 13.15 Hvat er CRM?
Hvat eiga vit at vita um kundarnar?
Hvussu kann CRM skipast?
v/Mogens Ramsing
Kl. 15.00 Royndir við CRM í Føroyum
v/Poul Henrik Poulsen
Kl. 16.00 Kunningarfundurin endar

**Kostnaður:**
Fyri annan av døgunum (ein kunningarfund) kr. 800,- u/mvg.
Fyri báðar dagarnar (tveir kunningarfundir) kr. 1.400,- u/mvg

Við í luttøkugjaldinum er skeiðstilfar og kaffi og sodkakur

**Boða frá luttøku á**
TK Stovuni, faks nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupostur tk@tk.fo Seinasta freist at tekna seg til er hósdagin 15. mai 2003

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
Tel. +298 317366, Fax +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av ít [illegible] danska TK-kunningarsamstarvinum



www.sosialurin.fo


www.sosialurin.fo